

**Toyota Corolla 1.9 D Linea Terra S/D** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AG 716 **Km:** 101.000
**Árgangur:** 26.04.00 **Seinast sýnaður:** 26.10.05

**Kr. 78.000,-**



**Toyota Corolla 2.0 D STW** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JH 868 **Km:** 190.000
**Árgangur:** 20.05.98 **Seinast sýnaður:** 16.12.05

**Kr. 60.000,-**



**Toyota Avensis 1,8 Terra** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MJ 943 **Km:** 124.000
**Árgangur:** 26.11.98 **Seinast sýnaður:** 27.08.04

**Kr. 82.000,-**



**Toyota Avensis 1,8 Luna** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BR 614 **Km:** 73.000
**Árgangur:** 20.10.99 **Seinast sýnaður:** 12.12.05

**Kr. 90.000,-**



**Toyota Corolla 1,3 XLI STW** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SJ 873 **Km:** 137.000
**Árgangur:** 29.03.96 **Seinast sýnaður:** 21.07.05

**Kr. 39.000,-**



**Toyota Camry 3,0 GL Sedan aut.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** ER 235 **Km:** 94.000
**Árgangur:** 12.04.00 **Seinast sýnaður:** 09.11.05

**Kr. 165.000,-**



**Toyota Corolla 1,6 Linea Terra aut.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GA 763 **Km:** 88.000
**Árgangur:** 20.12.00 **Seinast sýnaður:** 10.02.05

**Kr. 82.000,-**



**Citroen Picasso 1.8** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BV 067 **Km:** 45.000
**Árgangur:** 17.04.02 **Seinast sýnaður:** 20.04.06

**Kr. 125.000,-**



**Skoda Fabia 1.4** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** EL 476 **Km:** 79.000
**Árgangur:** 27.06.02 **Seinast sýnaður:** 23.03.06

**Kr. 86.000,-**



**Citroen Xsara 1.6** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TU 853 **Km:** 105.000
**Árgangur:** 23.05.02 **Seinast sýnaður:** 20.03.06

**Kr. 94.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, í eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.


# Skiparahugburður millum stjórarnar

**Petur Petersen, aðalstjóri, hevur gjørt eina kanning av føroysku stjórunum. Hann viðgerð kanningina í filminum, sum varð vístur á Vinnudegnum**



VINNUDAGUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Kanningin vísir, at føroysku stjórarnir eru ungir, og at teir hava sitið leingi, hóast teirra unga aldur. Stjórarnir sita í miðal í tólv ár. Tá ið stjórarnir vórðu spurdir, hvørji viðurskifti eru tey týdningarmestu í teirra fyritøku, svara teir flestu, at starvsfólkviðurskifti, handilsviðurskifti og umsiting eru týdningarmiklast.

Petur staðfestir, at tað er stórur munur á stjórunum í teimum privatu fyritøkunum og teimum almennu fyritøkunum. Stjórarnir í teimum privatu fyritøkunum skulu í størri mun skapa úrslit. Teir skulu hugsað um at fáa fyritøkuni at yvirliva, meðan teir almennu stjórarnir hugsa meira um umsiting og onnur viðurskifti.

## Skiparahugburður

Leiðsluháttурin er bundin at mentanini. Teir almennu stjórarnir hava ofta eina hægri útbúgving frá einum lærustovni uttanlanda, og teir eru tí ávirkaðir av leiðslumentanini har. Teir privatu stjórarnir hava mangan fingið uppalingina frá teirra gomlu stjórum, og tí er hugburðurin øðrvísi. Sum heild kann sigast, at privatu fyritøkurnar brúka ein leiðsluhátt, sum er ávirkaður av „skiparahugburðinum". Hetta er ein kontantur leiðsluháttur, sum eisini verður kallaður fyri „management".

Teir almennu stjórarnir nýta ein leiðsluhátt, sum minnir um sokallað „leadership", har ið stjórin samskipar og útdelegerar.

– Tað er torført at siga, hvør leiðsluháttur er betri, men ein kanning vísir, at ein samanrenning av „management" og „leadership" gevur besta úrslit, sigur Petur Petersen.

Filmurin kann síggjast á www.foryoabanki.fo

# Ov lítil útskifting í føroysku nevndunum

**Katrin á Neystabø hevur gjørt eina kanning av føroyskum nevndararbeiði. Niðurstøðan er, at nógv kann betrast innan føroyskt nevndararbeiði - serliga í teimum smærru fyritøkunum**



VINNUDAGUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Filmurin um føroyska leiðslu, sum varð sýndur á Vinnudegnum, viðgjørdi tvær kanningar, sum Petur Petersen og Katrin á Neystabø hava gjørt.

Katrin er lesandi, og hon hevur gjørt kanningina um nevndirnar. Kanningin vísir, at tær størru fyritøkurnar hugsa langt og leggja strategi. Tær hava yvirskot til at nýta orku til at menna og vaksa um virksemið.

Tær smærru fyritøkurnar hava ikki so gott nevndararbeiði. Tær arbeiða meira við bráðneyðugum trupulleikum, og nýta ikki tíð til at leggja virksemisætlan ella tílíkt.

Nevndirnar í teimum størru fyritøkunum arbeiða óheft av leiðsluni, meðan tað eru persónligar samanrenningar millum nevndarlimir og leiðsluna í teimum smærru fyritøkunum.

Sum heild verður ov lítil orka nýtt til starvsskipan og virkisætlan.

Tað er lítil útskifting í føroysku nevndunum. Hvør nevndarlimur situr í miðal í 6 ár, og hvør nevndarformaður situr í miðal í 9 ár. Tað sæst eisini, at somu persónar ganga aftur í leiðslu og nevndum, vísir Katrin á.

Katrin heldur, at útlendsk umboð betra um nevndararbeiði. Tey hava ein altjóða hugburð og hjálpa fyritøkuni at koma út á marknaðin. Tí er tað so upplagt, at brúka útlendsk nevndarumboð, sigur Katrin.

Grundleggjandi trupulleikin er, at tað manglar útskifting og eftirmeting í føroyska nevndararbeiðinum.

Filmurin kann síggjast á www.foroyabanki.fo.